Guðrið Dam Andreasen

Fylgiskjal 7

Fra: Árni Vitalis <arnivh@gmail.com>
Sendt: 27. februar 2020 23:03
Til: Katrin Thorsvig Hansen
Cc: Michael Dalbø
Emne: Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um vápn v.m.

Til
Katrin Thorsvig Hansen, LØGMANSSKRIVSTOVAN

Mál nr.: 0626-091/19

Ummælisskriv til "Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um vápn v.m. (reglur um útflutning av vápnum og um atgongd til vápnaskránna)."

Takk fyri at hava kunnað okkum um møguleikan at koma við einum ummælisskrivi.

Til sjálvt endamálsorðingina til uppskotið hava vit eina lítla viðmerking, men taka annars fult undir við uppskotinum:

- 1.3. Endamálið við uppskotinum
Orsøkin til hesa ætlaðu broyting í kunngerðini er, at m.a. Skjótisamband Føroya áhaldandi vísir á tørvin hjá føroyingum, sum ferðast við vápnum til kappingar o.a. í útlondum, at hava eitt sokallað vápnapass, sum ger ferðing lættari. Útflutningsloyvi við longri gildistíð enn tann einstaki uttanlandsstúrurin lættir um umsitingarliga hjá bæði skjúttum og myndugleika.

Vit í Veiði- og Skjótifelag Føroya umboða ein breiðan skara av skjótiáhugaðum - herundir veiðufólk. Tí átti endamálsorðingin omanfyri eisini víst á veiðufólk, sum ferðast uttanlanda fyri at veiða. Nú stendur: "kappingar o.a. í útlondum". Hetta "o.a." vísir møguliga til veiðu v.m., men fyri at viðkomandi myndugleika persónur, sum kemur at umsita loyvini, ikki einans gevur loyvi til kappingar, hevði tað verið gott um tað stóð: "til kappingar, venjingar, veiðu v.m."

Vit fara tó at nýta høvið at kunna tykkum um, at vit gjørdu eitt kladdu-uppskot til nýggja vápnalóg í 2016. Hóast vit fingu lova bæði eitt og annað, kom okkara kladdu-uppskot ikki víðari undir seinastu samgongu. Tí vilja vit hervið vinarliga heita á tykkum um, at t.d. hava fund við okkum viðv. okkara kladdu-uppskotið fyri at vita, um tit kunnu taka undir við øllum ella partar av tí.

Vegna Veiði- og Skjótifelag Føroya
Michael Dalbø og Árni Vitalis